– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Nýggj stór og frálík hús á Velbastað

**Húsini standa í sera náttúruvøkrum umhvørvi við panoramaútsýni, og tað tekur bara 7 min. at koyra til Havnar.**









## Umvørvið uttan

Tú koyrir til Velbastað og snarar til vinstru við fyrsta vegin, tá ið tú kemur til bygdina. Í umhvørvinum standa fleiri nýggj hús, og fleiri eru á veg. Her er friðarligt, og panoramaútsýni er yvir bygdina, út á Hest, Koltur, Vágar og yvir á Sandoynna. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Barnagarður, frítíðarskúli, frískúli og vanligur skúli eru í bygdini, eins og sparkivøllur og busssamband til Havnar er nær við. Tá ið tú kemur til húsini, sært tú, at alt er nýtt og feskt. Nakað er gjørt uttanum, men tú hevur eisini møguleikan at seta tín egna dám á tað nærmasta umhvørvið uttan um húsini, og halda fram at gera garð / urtagarð og annað.

## Inni – stílur og snið

Húsini eru væl teknaði og væl bygd úr besta tilfari og besta handverki, samstundis sum stílur og snið, rakstur og viðlíkahald, hugni og livilighet ganga upp í eina hægri eind. Alt er ljóst og vakurt, og húsini eru skipað og innrættað, so øll kunnu vera saman og hvør sær. Frálíkt baðirúm, hjúnarúm og 2 kømur er í ovaru hædd, meðan hini kømurini eru í niðaru hædd, har møguleiki eisini er fyri at gera baðirúm. Sostatt eru 7 kømur í alt. Sjálvsagt kann hjúnarrúmið brúkast til vanligt kamar ella arbeiðsrúm, og hurð er út til altan / útigólv, har tú kanst fáa tær ljós og luft og njóta frálíka útsýnið yvir Skopunarfjørð og Hestfjørð. Stóru vindeyguni geva tær ikki bara panoramaútsýni úr øllum húsunum, men eisini ljós og luft. Tú kennir teg ikki innilæstan, men so at siga eitt við umhvørvið, samstundis sum tú kennir teg væl og virðiliga inni hjá tær sjálvum. Tað er ein sonn fragd at sita við stóra borðið í ljósa alrúminum og njóta frálíka útsýnið og umhvørvið. Her er einki at hugsa um. Alt er gjørt liðugt innan, so tú kanst flyta beint inn í frálíku húsini.

## Innrætting

Hvør hæddin er 136 $m^2$. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur, grovkøkur við egnari inngongd, stova, hjúnarúm við atgongd til altan, 2 kømur, baðirúm við brúsu og gosbaði og gestawc. Í niðastu hædd er kjallararúm, garaga, inngongd, durur, gongd og 4 kømur.

## Fakta

| | |
|---|---|
| Bústaður: | Ervavegur 4, Velbastaður |
| Byggiár: | 2005 |
| Hæddir: | 2 |
| Gólvvídd: | 272 $m^2$ |
| Grundøki: | 591 $m^2$ |
| Prísuppskot: | hóskandi boð |









PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**